# VANLIGAR VIÐSKIFTATREYTIR FYRI PRIVATKUNDAR

*Galdandi frá 1. august 2026*

Vælkomin í Norðoya Sparikassa (framyvir "peningastovnurin").

Vanligu viðskiftastreytirnar eru galdandi fyri alt viðskifti millum teg og peningastovnin, um ikki annað er avtalað.

Vilt tú gerast kundi hjá peningastovninum, skalt tú fyrst stovnast sum kundi. Hevur tú Samleikan, er stovnanin talgild. Hevur tú ikki Samleikan, skalt tú fylla eitt stovningarskjal út. Tú skalt millum annað upplýsa navn, bústað og P-tal, og fyri at prógva upplýsingarnar skal peningastovnurin hava avrit av eitt nú passi, koyrikorti, dópsbrævi, navnabrævi ella P-talsváttan.

Tú kanst einans brúka tínar privatu kontur, tíni privatu gjaldskort og aðrar privatar tænastur til privat endamál, uttan so at tú hevur gjørt skrivliga avtalu um vinnutreytir við peningastovnin.

Í flestum viðskiftum í peningastovninum eru seravtalur galdandi, t.d. avtala um virðisbrævahandil, avtala um Visa/Dankort og avtalur um gjaldskontur. Fyri gjaldskontur, sum eru fevndar av lóg um gjaldingar, galda hartil treytir fyri gjaldskontur. Hava tú og peningastovnurin avtalu um treytir, sum víkja frá vanligu viðskiftatreytunum, eru avtalaðu treytirnar galdandi.

Peningastovnurin skrásetir og brúkar dátur um teg til at veita tær góða ráðgeving, og fyri at halda tey løgfrøðiligu krøv, ið verða sett peningastovnum. Tú fært nærri kunning um, hvørjar upplýsingar peningastovnurin skrásetir, hví peningastovnurin skrásetir tær, umframt hvørji rættindi, tú hevur, undir upplýsingar um viðgerð av persónupplýsingum hjá peningastovninum á heimasíðuni hjá peningastovninum.

Starvsfólk í peningastovninum hava tagnarskyldu um tíni viðurskifti við peningastovnin og kunnu ikki uttan heimild geva øðrum upplýsingar, sum tey fáa um teg í sínum starvi í peningastovninum.

Reglurnar fyri tagnarskyldu eru sambært lóg um fíggjarligt virksemi.

Fyrri partur í vanligu viðskiftatreytunum ásetir rættindi og skyldur hjá tær og peningastovninum. Seinni partur fevnir um almennar upplýsingar hjá peningastovninum um kundaviðurskifti.

## 1. RENTUR

### 1.1 Upplýsing um rentustig

Tú fært ella rindar rentu av innlánum og rindar rentu av lánum og kredittum. At tú rindar rentu av innlánum vil siga, at peningastovnurin eisini kann rokna negativa rentu av innlánum á tínum kontum.

Vanligu rentustigini hjá peningastovninum síggjast á heimasíðuni hjá peningastovninum og verða upplýst, um spurt verður eftir teimum.

Øll rentustig eru skiftandi, uttan so at annað er greitt ásett.

### 1.2 At broyta skiftandi rentustig uttan fráboðan

Peningastovnurin kann uttan fráboðan lækka rentustig á innlánum og hækka rentustig á lánum og kredittum vegna viðurskifti uttanífrá, sum peningastovnurin ikki hevur ávirkan á. Tað kunnu til dømis vera broytingar í

- almenna rentustøðinum, eisini á lánsbrævarentum, pengamarknaðarrentum og øðrum marknaðarrentum
- fíggingarútreiðslum
- kreditt- og pengapolitikki innanlands og/ella uttanlands ella tá ið pengapolitisk amboð verða nýtt.

### 1.3 At broyta skiftandi rentustig við at boða frá ein mánað frammanundan

Peningastovnurin kann fráboða rentulækkingar á innlánum og rentuhækkingar á útlánum ein mánað frammanundan, um broytingin er orsakað av handils-, marknaðar- ella lóggávuviðurskiftum. Tað kann t.d. vera:

- at broytingar henda í teimum viðurskiftum, sum hvør í sínum lagi vóru grundarlag undir ásetingini av tínum rentutreytum. Tað kunnu t.d. vera broytingar í, hvussu nógv viðskifti tú hevur við peningastovnin, umframt broytingar í tali og vavi av tínum innlánum, lánum ella kredittum



Norðoya Sparikassi Ósávegur 1 Postboks 149 FO-710 Klaksvík Tel. 475000 ns@ns.fo www.ns.fo

- at broytingin hendir fyri at leggja upp fyri vaksandi útreiðslum, m.a. vegna broytt lógarkrøv til peningastovnar, øking í vanligum veðhaldsskipanum ella til at varðveita ella styrkja fíggjargrundarlagið fyri at leggja upp fyri øktum solvens-, fíggjar- ella gjaldføriskrøvum, ella øktum útreiðslum til at útvega kapital

- at peningastovnurin broytir sína vanligu rentuáseting av handilsligum ávum, t.d. fyri at økja um vinning ella fyri at brúka tilfeingi og førleikar hjá peningastovninum betur

- fyri at leggja upp fyri einum vanligum øktum kredittváða hjá peningastovninum.

### 1.4 Rentubroyting fyri lán við tilvísingarrentu

Um tú hevur avtalur við peningastovnin um lán ella kredittir, har mynsturrenta verður brúkt, t.d. tilvísingar-rentan CITA, kanst tú lesa meira um rentubroytingar og afturstigsætlanir á heimasíðuni hjá peningastovninum.

## 2. TÆNASTUGJØLD

### 2.1 Upplýsingar um tænastugjøld

Peningastovnurin kann taka gjøld fyri at veita tær tænastur og fyri at svara fyrispurningum viðvíkjandi tær, tá ið peningastovnurin hevur skyldu at svara.

Tey vanligu tænastugjøldini eru at finna á heima-síðuni hjá peningastovninum, og til ber eisini at spyrja peningastovnin.

### 2.2 Broyting av tænastugjøldum uttan ávaring

Peningastovnurin kann uttan ávaring áseta og hækka verandi gjøld fyri einstakar veitingar og sum heild fyri nýggjar avtalur.

Í avtaluviðurskiftum kann peningastovnurin uttan ávaring áseta nýggj gjøld og hækka verandi vegna viðurskifti uttanífrá, sum peningastovnurin ikki hevur ávirkan á. Tað kunnu t.d. vera broytingar í:

- fíggingarútreiðslum

- kreditt- og peningapolitikki innanlands ella uttanlands

- nýtslu av peningapolitiskum amboðum.

### 2.3 Broyting av gjøldum við at boða frá ein mánað frammanundan

Í verandi avtalum kann peningastovnurin boða frá ein mánað frammanundan, hann ásetur nýggj gjøld ella hækkar verandi, um broytingin er vegna handils-, marknaðar- ella lóggávuviðurskifti. Tað kann t.d. vera:

- at broytingar henda í teimum viðurskiftum, sum hvør í sínum lagi vórðu brúktar sum grundarlag, tá ið gjaldstreytirnar vórðu ásettar. Tað kunnu t.d. vera broytingar í, hvussu nógv viðskifti er millum teg og peningastovnin, m.a. broytingar í, hvussu stór og víðfevnd tíni innlán, lán og kredittir eru

- at broytingar henda fyri at leggja upp fyri øktum útreiðslum, og eisini vegna broytt lógarkrøv til peningastovnar, vøkstur í almennum trygdarskipanum ella til at varðveita ella styrkja fíggjargrundarlagið til at leggja upp fyri øktum solvens-, fíggjar- ella gjaldføriskrøvum ella øktum útreiðslum av at útvega kapital

- at peningastovnurin broytir sína vanligu gjaldsáseting av handilsligum orsøkum, t.d. fyri at økja um vinning ella til at fáa tilfeingi og førleikar hjá peningastovninum brúktar á skilagóðan hátt

- fyri at leggja upp fyri einum vanligum øktum kredittváða hjá peningastovninum.

Nýggj gjøld eru gjøld fyri veitingar, sum peningastovnurin ikki hevur tikið fyri áður.

### 2.4 Broyting av gjøldum við at boða frá tveir mánaðir frammanundan

Viðvíkjandi avtaluviðurskiftum um gjaldskontur, sum eru kontur stovnaðar til gjaldsflutning, kann peninga-stovnurin einans hækka síni gjøld og áseta nýggj gjøld við at boða frá tveir mánaðir frammanundan.

## 3. FRÁBOÐAN UM RENTU- OG GJALDSBROYTINGAR

Rentu- og gjaldsbroytingar verða lýstar í tíðindamiðlum, á heimasíðuni hjá peningastovninum ella við beinleiðis boðum á tín netbanka.

Rentubroyting sæst harumframt á fyrstu kontuútskriftini ella á kontuuppgerð eftir broytingina.

Rentubroytingar við støði í tilvísingarstigi, t.d. innskotspróvrenta hjá danska Tjóðbankanum, síggjast bara á kontuútskriftum ella uppgerðum frá peningastovninum.

## 4. RENTUDAGUR

Fylgjandi reglur eru nærum altíð galdandi:

Rentudagurin er, tá ið inngjald, útgjald ella onnur konturørsla fær gildi fyri útroking av rentum á einari kontu.

Bókingardagurin er, tá ið peningastovnurin skrásetir virksemi á kontuni. Bókingardagurin hevur ikki týdning fyri rentuútrokningina.

Leygardagar, sunnu- og halgidagar, flaggdagur, dýri biðidagur, grundlógardagur, ólavsøkuaftan, ólavsøkudagur jólaaftan og nýggjársaftan eru ikki bankadagar. Harafturat er dagurin eftir Kristi himmalsferðardag frídagur hjá donsku peningastovnunum og KT-veitaranum hjá føroysku peningastovnunum, og tí verða ongar flytingar framdar tann dagin.

### 4.1 Inngjøld

Tá ið goldið verður kontant , t.d. við Dankorti ella Visa/Dankorti, er rentudagurin sama bankadag sum inngjaldið.

Tá ið flyting verður framd í donskum krónum frá øðrum føroyskum ella donskum peningastovnum, er rentudagurin tann bankadag, sum inngjaldið verður sett á kontuna hjá móttakaranum.

Tá ið flyting verður framd í donskum krónum millum kontur í peningastovninum, er rentudagurin tann bankadag, tá peningastovnurin fær upphæddina.

Tá ið flyting verður framd frá útlandinum, og flytingin er flutt við øðrum gjaldoyra enn donskum krónum í Føroyum, verður víst til Treytir fyri flytingar til útheimin og frá útheiminum.

### 4.2 Útgjøld

Tá ið talan er um útgjald ella flyting av kontu, er rentudagurin tann bankadagin, upphæddin verður úttikin.

Tá ið kort verður brúkt í handli ella sjálvtøku, er rentudagurin tann dagin, upphæddin verður tikin av kontuni.

Rindar tú við gjaldskorti á telefon, kunnu fleiri dagar ganga, áðrenn peningurin verður tikin av kontuni.

Tá ið talan er um flyting til onnur lond og flyting í øðrum gjaldoyra enn DKK í Føroyum ella Danmark, verður víst til Treytir fyri flytingar til útheimin og frá útheiminum.

### 4.3 Serstøk kontusløg og serstakur flutningur

Fyri serstøk kontusløg og serstakan flutning verður renta roknað eftir serstøkum rentudagaskipanum, t.d. tá ið talan er um virðisbrævahandil og inn- og útgjald í útlendskum gjaldoyra.

### 4.4 Útrokning og afturatskriving av rentum og provisión

Meginreglan er, at rentur verða roknaðar út dagliga. Nærri kunning um, hvat er galdandi fyri hvørja einstøku kontu, fæst við at venda sær til peningastovin.

Fyri innlán verða rentur vanliga tilskrivaðar hvønn ársfjórðing, hálvárliga ella eina ferð um árið. Fyri lán, kredittir og ábyrgdir verða renta og provisión vanliga tilskrivaðar mánaðarliga, hvønn ársfjórðing, hálvárliga ella árliga.

Peningastovnurin kann velja at taka negativa innlánsrentu mánaðarliga, hvønn ársfjórðing ella árliga. Negativ renta verður antin tikin av ávirkaðu kontunum ella sum samanløgd upphædd av einum ella fleiri kontum.

Peningastovnurin kann gera av, at rentur, sum eru lægri enn eitt ávíst, detta burtur ella halda fram til næsta gjaldsdag.

Peningastovnurin kann altíð velja at steðga rentutilskriving fyri misshildin krøv fyrisitingarliga og roknskaparliga.



Norðoya Sparikassi Ósávegur 1 Postboks 149 FO-710 Klaksvík Tel. 475000 ns@ns.fo www.ns.fo

Um rentutilskriving steðgar, og tað ikki er sambært avtalu við teg, merkir tað ikki, at peningastovnurin sigur frá sær rættin at fáa sítt krav at bera rentu og til at krevja fulnað fyri útreiðslur, sum eru íkomnar seinni. Tað er galdandi, hóast tað á kontuútskrift ella tílíkum stendur, at rentutilskrivingin er steðgað.

## 5. TROTARENTA OG RYKKJARAGJALD O.A.

Peningastovnurin kann krevja trotarentu/-provisión, tá ið talan er um trot, ov seint gjald ella misnýtslu av tí, sum varð avtalað, og harumframt gjald fyri at senda rykkjarabrøv og útreiðslur til lógkøna hjálp í sambandi við innheinting o.a.

Trotarenta fevnir eisini um sektarrentu. Upplýsingar um trotarentu síggjast í netbankanum undir kontutreytunum.

Á gjaldskontum síggjast rentustig fyri trot á kontuútskriftum og kontuavtaluni.

Støddin á rykkjaragjøldum sæst í prísbókini hjá peningastovninum.

## 6. FYRIVARNI Í SAMBANDI VIÐ INNGJØLD

Øll inngjøld á tína kontu, sum ikki verða framd kontant, verða framd við tí fyrivarni, at peningastovnurin fær upphæddina. Fyrivarnið er galdandi, hóast tað ikki er nevnt á kvittan ella aðrari fráboðan um inngjaldið.

Inngjald á tína kontu verður framt til ávíst kontunummar uttan mun til aðrar ávístar upplýsingar.

Peningastovnurin kann flyta upphæddir aftur, sum eru settar inn á tína kontu av eyðsýndum misgáum, t.d. um sama upphædd er sett inn tvær ferðir.

Peningastovnurin kann sambært avtalu við aðrar føroyskar ella danskar peningastovnar hava skyldu til at forða ella flyta upphædd aftur, t.d. upphædd, ið er flutt sum fylgja av sviki.

Um peningastovnurin hevur illgruna um, at ein upphædd er móttikin sum fylgja av sviki, kann peningastovnurin steingja kontur, til skjalprógv er fingið til vega um, at tú hevur rætt til upphæddina.

## 7. EFTIRLIT

Tú hevur skyldu til leypandi at kanna bókingar á tínum kontum. Eru bókingar, sum tú ikki kennist við, skalt tú skjótast gjørligt seta teg í samband við peningastovnin. Mótmæli viðvíkjandi gjaldsflutningi, fevnt av gjaldslógini, skal kortini gerast innan 13 mánaðir eftir, at gjaldsflutningurin er framdur.

## 8. FULLTRÚIR

Hvør eigari hevur einsamallur ræði á felagskontum og goymslum, uttan so at peningastovnurin fær boð um annað. Tað sama er galdandi, tá ið fleiri verjar hava atgongd til kontu hjá einum ómyndigum.

Tú kanst geva øðrum persóni fulltrú til tínar kontur og goymslur. Tað verður gjørt skrivliga og vanliga á fulltrúaroyðublað hjá peningastovninum.

Tú kanst altíð broyta ella kalla eina fulltrú aftur. Broyting ella afturkalling skal somuleiðis gerast skrivliga.

Fulltrúin heldur uppat av sær sjálvari, tá ið peningastovnurin frættir, at fulltrúarveitarin er deyður, og peningastovnurin steingir kontur og goymslur, til skiftirætturin hevur tikið støðu til búgvið.

Eisini felagskontur og felagsgoymslur verða stongdar, tá ið peningastovnurin frættir, at eigarin er deyður.

## 9. ENDURRINDAN AV ÚTREIÐSLUM

Peningastovnurin hevur rætt til at fáa fylgjandi endurrindað:

- upphæddir, sum peningastovnurin leggur út tína vegna, so sum skattir, avgjøld og samskiftisútreiðslur
- útreiðslur, sum peningastovnurin fær, um tú misheldur tínar avtalur, so sum tryggingargjøld, útreiðslur í sambandi við veðsetta trygd, rættargjøld, lógkøna hjálp o.a.

## 10. VIÐSKIFTI UTTANLANDS

Um peningastovnurin tína vegna skal útinna tænastur í øðrum londum, velur peningastovnurin eitt viðskiftasamband, um ikki annað er avtalað. Peningastovnurin hevur ikki ábyrgd av mistøkum, sum tann valdi peningastovnurin ella lánføri hjá hesum elva til.

Um tú hevur útlendsk virðisbrøv á goymslu umvegis peningastovnin, hevur peningastovnurin ábyrgd av møguligum mistøkum hjá útlendska viðskiftasambandinum og lánføri hjá hesum, uttan so at tú sjálv/ur hevur valt viðskiftasambandið.

Bæði tú og peningastovnurin eru undirgivin rættarreglur, siðvenju og handilstreytir, sum eru galdandi fyri avtaluna við tann útlendska peningastovnin.

## 11. BÚSTAÐARBROYTING OG FLYTING TIL ÚTLOND

Tú hevur skyldu til at boða peningastovninum frá, um tú skiftir bústað.

Um tú flytur til, býrt ella ert uttanlands í longri tíðarskeið, er tað ikki vist, at peningastovnurin fær bjóðað tær somu tænastur, sum vart tú í Føroyum.

## 12. UPPSØGN OG STONGSIL

Tú kanst altíð og uttan ávaring enda kundasambandið. Peningastovnurin kann siga kundasambandið upp, um sakligar grundir eru fyri uppsøgnini.

Tá ið kundasambandið heldur uppat, kann peningastovnurin siga upp trygdar- og borgsavtalur, íroknaðar skyldur í fremmandum gjaldoyra, og loysa seg frá øðrum møguligum avtalum við teg. Tú hevur skyldu til at loysa peningastovnin frá øllum avtalum, sum eru gjørdar tína vegna og, um neyðugt, veita trygd fyri hesum.

Tú hevur skyldu til at lata peningastovninum tær upplýsingar um teg og títt kundaviðskifti, sum peningastovnurin metir vera neyðugar at savna inn sambært lóggávu, t.d. skattalógini og hvítvasklógini. Fær peningastovnurin ikki umbidnu upplýsingarnar, kann peningastovnurin uppsiga kundaviðskiftið við teg uttan ávaring.

Peningastovnurin kann somuleiðis uppsiga kundasambandið uttan ávaring, um tú heilt ella lutvíst verður fevnd/ur av revsitiltøkum frá t.d. ES ella ST, sum standa á listanum við yvirliti yvir revsitiltøk hjá danska uttanríkisráðnum. Tað sama er galdandi fyri persónar, sum hava rætt til at taka avgerðir tína vegna ella standa tær nær.

Tú fært boð um uppsøgnina antin við beinleiðis boðum ella á annan hátt.

Peningastovnurin kann steingja tínar kontur, atgongd til netbanka og aðrar tænastur og veitingar, um tú ikki gevur peningastovninum allar upplýsingar, sum peningastovnurin hevur skyldu til at útvega sambært lóg.

Verður peningastovnurin varugur við, at upplýsingar eru villeiðandi ella skeivar, verða tær rættaðar.

Um peningastovnurin hevur rangar upplýsingar um eitt nú tín bústað, teldupost ella telefonnummar, ella peningastovnurin av øðrum ávum ikki fær samband við teg, kann peningastovnurin sperra tínar bankatænastur.

## 13. ENDURGJALDSÁBYRGD

Peningastovnurin hevur endurgjaldsábyrgd, um peningastovnurin vegna mistøk ella av vansketni røkir avtalaðar skyldur ov seint ella ófullfíggjað.

Sjálvt á teimum økjum, har strangari ábyrgd valdar, hevur peningastovnurin ikki ábyrgd av tapi, sum stendst av:

- sliti í ella vantandi atgongd til KT-skipanir ella skaða í upplýsingum í hesum skipanum, sum kunnu vísast til hendingar, ið eru nevndar omanfyri, sama um tað er peningastovnurin sjálvur ella ein útvegari uttanífrá, ið rekur skipanirnar
- breki í streymveiting ella telesamskifti hjá peningastovninum, lógarinntrivi ella fyrisitingargerðum, náttúruvanlukkum, kríggi, uppreistri, borgarligum ófriði, herverki, yvirgangi ella valdsgerðum (undir hesum telduvirus og teldusníking)

- verkfalli, verkbanni, handilsbanni ella stongsli, sama um ósemjan er beind ímóti ella sett í verk av peningastovninum sjálvum, fakfeløgum ella øðrum felagsskapum, og uttan mun til hvør orsøkin til ósemjuna er. Sama er galdandi, tá ósemjan einans rakar ein part av peningastovninum

- øðrum umstøðum, sum eru uttan fyri ávirkan hjá peningastovninum.

Ábyrgdarfrælsið hjá peningastovninum er ikki galdandi, um

- peningastovnurin átti at væntað tey viðurskifti, sum eru orsøk til tapið, tá ið avtalan varð gjørd, ella átti at havt komið sær undan ella bast orsøkini til tapið

- lóggávan í øllum førum gevur peningastovninum ábyrgdina av teimum viðurskiftum, sum eru orsøk til tapið.

## 14. MÓTROKNING

Peningastovnurin kann uttan at boða frá frammanundan mótrokna eina og hvørja áogn hjá tær, sum er fallin til gjaldingar, í einari og hvørjari áogn, sum tú hevur ella fært hjá peningastovninum. Hetta er tó ikki galdandi fyri tann part av tíni løn, almennu veiting o.ø., sum er neyðug fyri at hava nóg mikið til vanligan livikostnað. Summi innlán eru við lóg vard ímóti kravánarum og sostatt mótrokning.

Peningastovnurin gevur fráboðan um mótrokning.

## 15. MÁL OG SAMSKIFTI

**Mál**

Peningastovnurin ger avtalur og samskiftir á føroyskum, uttan so at annað er nevnt í ítøkiligu avtaluni.

**Talgilt samskifti**

Peningastovnurin skilar sær rætt til at geva kundum allar upplýsingar í elektroniskum líki, hóast tað í skjølum, handilstreytum, reglugerðum o.s.fr. verða nýtt orð sum "skrivliga", "bræv", "kontuavrit", "yvirlit" o.l.

Tú fært allar fráboðanir, kontuavrit, ársuppgerðir, møgulig áminningarskriv, notur og annað í netbankan. Tú kanst tó gera avtalu við peningastovnin um, at omanfyri nevnda verður sent á pappíri, men tað kann peningastovnurin taka gjald fyri.

Peningastovnurin kann altíð gera av at senda tær vanligan post. Um peningastovnurin av sínum eintingum velur vanligan post, rindar tú ikki fyri tað.

Talgild brøv og skjøl hava sama rættarvirknað, sum vórðu tey send við vanligum posti.

## 16. LÓGARVAL OG VARNARTING

Rættarlig trætumál við teg verða avgjørd eftir føroyskum/donskum rætti og við ein føroyskan/danskan dómstól.

## 17. BROYTING AV TEIMUM VANLIGU VIÐSKIFTATREYTUNUM

Peningastovnurin kann uttan ávaring broyta tær vanligu viðskiftatreytirnar, tá ið tað er til tín fyrmun. Um broytingin ikki er til tín fyrimun, skulu broytingar henda við 1 mánaða ávaring.

Rentu- og gjaldsbroytingar verða lýstar í tíðindamiðlunum, á heimasíðuni hjá peningastovninum ella við beinleiðis boðum á tín netbanka.

Broytingar, sum ikki eru til tín fyrimun, verða fráboðaðar í brævi, við beinleiðis boðum á tínum netbanka ella í tíðindamiðlum, við tilvísing til hvar á heimasíðuni hjá peningastovninum, broytingarnar eru at finna.



Norðoya Sparikassi Ósávegur 1 Postboks 149 FO-710 Klaksvík Tel. 475000 ns@ns.fo www.ns.fo

NORÐOYA SPARIKASSI

## ALMENNAR UPPLÝSINGAR

Peningastovnurin hevur skyldu at boða frá fylgjandi almennu upplýsingum um kundaviðurskifti.

### 1. GÓÐ SIÐVENJA Í FÍGGJARLIGUM FYRITØKUM

Sambært reglugerð um góða siðvenju fyri fíggjarligar fyritøkur skal peningastovnurin upplýsa um móttøku av provisión ella aðrari samsýning í sambandi við miðling av tilboðum og veitingum.

Upplýsingar um samstarvsfelagar og móttøku av provisiónum fáast á heimasíðuni hjá peningastovninum ella á deildum peningastovnsins.

### 2. KÆRA

Um tú vilt kæra peningastovnin, skalt tú í fyrstu atløgu seta teg í samband við ta deildina í peningastovninum, sum umsitur tíni kundaviðskifti.

Um tú eftir hetta ert ósamd/ur við peningastovnin um viðgerðina av tíni áheitan ella úrslitið av henni, kanst tú seta teg í samband við kæruábyrgdarhavaran í peningastovninum. Upplýsingar um kæruábyrgdarhavaran fáast á heimasíðuni hjá peningastovninum ella á deildunum hjá peningastovninum.

Um nøktandi loysn ikki finst millum peningastovnin og teg sum peningastovnskunda, kanst tú kæra til donsku Fíggjarligu Kærunevndina (Det Finansielle Ankenævn), tlf. 35 43 63 33, www.fanke.dk. Kæran til Fíggjarligu Kærunevndina skal viðvíkja einari ítøkiligari fíggjarligari trætu, sum hevur verið fyri kæruábyrgdara í viðkomandi peningastovni uttan loysn, og kravið skal vera íkomið eftir 1. januar 2011. Kæran skal orðast á donskum ella enskum.

Kæra viðvíkjandi hvørt peningastovnurin heldur fíggjarliga lóggávu kann leggjast fyri Fíggjareftirlitið (Finanstilsynet), tlf. 33 55 82 82, www.finanstilsynet.dk. Kæran skal orðast á donskum ella enskum.

Kæra viðvíkjandi viðgerð av persónupplýsingum hjá peningastovninum av persónupplýsingum kann leggjast fyri Dátueftirlitið, tlf. 309100, www.dat.fo.

### 3. EFTIRLIT

Peningastovnurin hevur loyvi frá Fíggjareftirlitinum sum peningastovnur við nummari: FT-nr. [Reg.nr.] 9865.

Peningastovnurin er undir eftirliti av Fíggjareftirlitinum, tlf. 33 55 82 82, www.finanstilsynet.dk.

### 4. TRYGDARGRUNNURIN FYRI INNSKJÓTARAR OG ÍLEGGJARAR (GARANTIFORMUEN)

Umvegis Trygdargrunnin fyri innskjótarar og íleggjarar ert tú sum kundi í peningastovninum í ávísan mun tryggjaður móti tapi, um peningastovnurin fer á húsagang.

Trygdargrunnurin tryggjar m.a. navnsnevnd innskot við upphædd upp til tað, sum svarar til 100.000 evrur fyri hvønn innskjótara. Ávís innskot verða tryggjað við hægri upphædd í avmarkað tíðarskeið.

Eftirlønarkontur verða tryggjaðar óavmarkað í upphædd. Innskot, sum eru gjørd áðrenn 1. januar 2018, og sum áðrenn henda dag vóru tryggjað óavmarkað í upphædd, verða framhaldandi tryggjað óavmarkað, til tíðin er komin til útgjald til rætta viðkomandi, ella endamálið er rokkið.

Trygdargrunnurin tryggjar eisini upp til eina upphædd, sum svarar til 20.000 evrur, um tú sum íleggjari ert fyri missi, tí at avvarðandi peningastovnur ikki fær latið tær virðisbrøvini aftur, sum peningastovnurin umsitur, røktar ella hevur í varðveitslu.

Fleiri upplýsingar um Trygdargrunnin eru á heimasíðuni hjá Fíggjarligum Støðufesti (Finansiel Stabilitet), www.fs.dk, og á heimasíðuni hjá peningastovninum.

### 5. SAMBAND

Samband fæst við Norðoya Sparikassa á:

Norðoya Sparikassi<br>
Ósávegur 1<br>
Postsmoga 149<br>
FO-700 Klaksvík<br>
Teldupostur:ns@ns.fo<br>
Tel: 475000<br>
V-tal: 308382

NORÐOYA SPARIKASSI

## 6. UM ALMENNU UPPLÝSINGARNAR VERÐA BROYTTAR

Peningastovnurin kann broyta almennu upplýsingarnar uttan ávaring.

Upplýsingar um broyting í almennu upplýsingunum verða veittar skrivliga, talgilt ella við lýsing í tíðindamiðlunum, og víst verður til, hvar á heimasíðuni hjá peningastovninum broytingarnar eru at finna.



Norðoya Sparikassi Ósávegur 1 Postboks 149 FO-710 Klaksvík Tel. 475000 ns@ns.fo www.ns.fo